Bjarki Johannesen, koyrilærari:

Ferðslan í Føroyum er eitt ljós

Bjarki Johannesen, sum er koyrilærari, heldur at hugburðurin í ferðsluni í Føroyum skal eitt sindur upp. Tó sigur hann, at ferðslan her heima er eitt ljós aftur í móti ferðsluni í til dømis Paris, Prag, Rom og øðrum útlendskum býum

FERÐSLA
Ingrid Bjarnastein

– Arbeiðast skal eitt sindur meira við hugburðinum, har vit uppbyggja ein moral. Tað er lætt at siga, hvussu tú eigur at uppføra teg í ferðsluni, men skeivar vegaavmerkingar og annað ger bara, at hugburðurin dalar, sigur Bjarki Johannesen, koyrirlærari, sum vísir á, at tá vegaarbeiði verður gjørt, so standa skeltini uppi, sjálvt um vegaarbeiðararnir eru farnir heim, ella um tað er vikuskifti.

– Tá vegamyndugleikarnir sjálvir ikki uppføra seg rætt, so ger tað, at hugburðurin millum fólk dalar. Og tað er hesum arbeiðast skal eitt sindur meira við.

Annars heldur Bjarki, at føroyingar uppføra seg pent í ferðsluni. Einasta hann fílist á er, at fólk eru ikki so røsk at blunka, tá tey skulu av vegnum ella sneiða inn á ein annan veg.

– Men tað eru so nógv ting í ferðsluni, sum eru rættiliga nýggj, og tí noyðist ein eisini at taka fyrilit fyri tí, at tey eldur eru ikki uppvaksin undir hesum ferðsluumstøðunum, sigur Bjarki Johannesen. – Her verður hugsað um rundkoyringar, ljósreguleringar og tílíkt, sum er heilt nýtt í føroyskum ferðsluhøpi.

Bjarki Johannesen, sum er koyrilærari í Havn, heldur, at føroyska ferðslan er eitt ljós aftur í móti útlendskari ferðslu

Koyra skjótari

Koyrilærarin heldur, at á ávísum støðum skuldi verið loyvt at koyrt skjótari.

– Nógvir av vegunum eru so góðir í dag, at tað skuldi verið loyvt at koyrt 100 km/t. Tá hugsi eg um góðar, breiðar vegir, har umstøðurnar eru til tess. Har tað verður verri sýni, og vegirnir eru minni góðir, skal tað sjálvandi ikki verða loyvi at koyra 100 km/t men hetta kann ein so avmerkja við skeltum. Fyrr var tað bara loyv at koyra 100 km/t á motorvegunum í Danmark, men tey flestu koyrdu upp í móti 110. Donsku ferðslumyndugleikarnir valdu so heldur at flyta markið upp á 110, tí so sluppu teir av við ein stóra trupulleika – altso tað at taka hvønn einasta bil, sum koyrdi yvir 100.

Bjarki vísir á, at flest øll koyra yvir 80 km/t, og at ein er óerligur yvirfyri sær sjálvum um ein avnoktar tað.

– Tú koyrir aftanfyri sýslumenn, løgtingsmenn, politistar og aðrar innan fyri hægru umsitingina í Føroyum, og teir koyra allir meira enn 80. Um markið varð flutt, so hevði ein stórur trupulleiki verið loystur.

Revsireglurnar eru eisini ov strangar. – Vit eru ikki meira enn menniskju, vit feila, og vegumstøðurnar eru soleiðis, at viðhvørt ert tú noyddur at bróta ferðslureglarnar, sigur Bjarki Johannesen. – Tak til dømis við køkubúðina, Áargeil, Stoffalág, har er tað soleiðis, at ein er noyddur at koyra útum hávatenninar fyri at síggja um nakar bílur kemur. Um tú ert óheppin kemur ein bílur og tekur í, og so er dómurin fallin. Trý ár treytaðan dóm og upp til eftiransandi koyriroynd.

Sjálvur heldur Bjarki, at tað skuldi verið soleiðis, at í fyrsta umfari fært tú eina bót. Um óhappið hendir einaferð afturat, so skuldi tú fylgt einum teoriskeiði, sum tú kanst vísa aftur á. Hendir óhappið eina triðju ferð skuldi tú farið upp til eina eftiransandi koyriroynd og fingið ein treytaðan dóm uppá eitt til hálvt annað ár. Ferðslureglurnar skuldu verið lagaðar meira til umstøðurnar.

Tørvur á hálkubreyt

Nógv eru, sum taka koyrikort. Hetta talið fylgir vanliga burðartalinum, umframt ein lítlan prosentpart, sum velur at bíða til tey eru eldri. Í løtuni er nýggj koyrikortkunngerð í umbúna. Til dømis verður mælt til, at kravda talið av koyritímum verður hækkað úr 16 tímum upp í 22 tímar.

– 22 tímar er ikki beinleiðis ov nógv, men ein eigur at kunna at ávísa, hvat tímarnir skulu brúkast til, og tað kann ein ikki í hesum føri. Vit brúka sama frálærukort, sum í Danmark, tó minus motorveg, jarnbreyt og annað, sum ikki kemur fyri í føroyskari ferðslu. Tað er ikki neyðugt at hækka tímatalið upp í 22, tí tað er longu har. Tørvurin hjá tí einstaka skal verða settur í hæddina. Tað einasta tú gert í einum slíkum føri er, at tú flytir ein marginal. Men um næmingurin í dag hevur tørv á at koyra 20 tímar, 22 tímar, 25 tímar ella meira, so koyrir hann hesar tímarnar.

Talan er eisini um at gera ein sokallaðan grulvigarð, har møguleiki er at koyra fyrstu koyritímarnar. Her verður hugsað um eitt avbyrgt øki við ongari ferðslu, har næmingurin fær høvi til at læra at brúka kobbling, gear og annað, áðrenn hann verður tveittur út í ferðsluna.

– Hesum er tað stórur tørvur á, eins og tað er stórur tørvur á eini hálkubreyt. Ein næmingur, sum tekur koyrikort um summarið hevur ongan møguleika fyri at sleppa at koyra í kava, og tá kavin kemur er hann púra ráðaleysur. Ein hálkubreyt hevði spart bæði landi og tryggingarfeløgum nógvar pengar.

Frálærubókin betrast

Frálærubókin, ið brúkt verður, er týdd úr norskum. Vit hava danska ferðslulóg, og tá ein skal upp í teori eru spurningarnir so føroyskir, at ofta skilja næmingarnir ikki, hvat spurt verður um, og ofta eru spurningarnir heldur ikki dagførdir. Vit hava danskt frálærukort, og alt hetta ger tað heila til ein peruvelling.

– Bókin og spurnarbókin fylgjast als ikki. Spurningarnir eru illa orðaðir, og ópedagogiskir, sigur Bjarki Johannesen.

– Tað hevur leingi verið talan um at gera eina nýggja frálærubók. Vit vóru á fundi fyri eini tveimum árum síðani, men enn er onki gjørt við málið. Men eg haldi ikki, at tað er bileftirlitið og ein fulltrúi í landsstýrinum, sum skulu gera hetta. Tað eru vit, koyrilærararnir, sum arbeiða við tí dagliga, ið eiga at verða spurdir eftir, tá slíkt verður gjørt.

Men nýggj koyrikortkunngerð er væl áleiðis. Hvussu verður nú at taka koyrikort fáa vit svar uppá um eina tíð.



Smyril skal liggja í Suðuroy

Henrik Old er sera óður um, at Smyril liggur í Havnini meðan verkfallið er. Hann vísir á, at um okkurt skuldi hent, og tørvur er á bráfeingis flutningi til Havnar ella aðrastaðni, og tyrlan ikki fær flogið, so er ongin, sum kann flyta sjúklingin víðari

VERKFALL
Ingrid Bjarnastein

– Tað er spinnandi galið, at Smyril liggur á Havnini, meðan verkfallið er, sigur Henrik Old. – Um tørvur er á bráfeingis flutningi er Smyril einasta trygd fyri, at tann sjúki sleppur vegin fram. Hevði Smyril siglt eftir ferðaætlanini hósdagin, so hevði hann ligið í Suðuroy nú, men av tí, at Strandferðslan avlýsti túrin áðrenn lýsingin varð lisin, so liggur skipið í Havnini nú, og hetta kann eg als ikki góðtaka!

Henrik Old sigur, at Strandferðslan hevur við hesum tikið partí við øðrum partinum.

– Teir eiga at sigla eftir ferðaætlanini. Tað er ein kunngerð og lóg, at farið verður soleiðis fram, og eg fari at krevja at Bjarni Djurholm finnur fram til tann, sum hevur tikið stig til at steðga við siglingini áðrenn tíðina, og at viðkomandi verður koyrdur úr starvi, tí hann er ikki egnaður, og hevur misskilt hvør høvuðsuppgávan er: At sigla ímillum.

– Bilar, fólk og útgerð vóru rikin heim aftur, tí tað fór at vera verkfall, men lýsingin kom ikki í útvarpið fyrr enn klokkan 12.45 og Smyril átti at vera farin av Havnini klokkan 12.30. Hetta má fáa fylgjur. Ein kann ikki góðtaka, at ein almennur stovnur ger soleiðis. Strandferðslan eigur ikki at taka partí við lønardeildina, og skipið skal ikki leggjast áðrenn tíðina, sigur Henrik Old.

20 dagar í fongsli

RÚSEVNI
Stefan í Skorini

Fríggjadagin var enn eitt mál í stóra rúsevna-málinum fyri í Føroya Rætti. Ein ungur maður fekk 60 daga fongsulsrevsing fyri at have keypt nógv ymisk sløg av rúsevnum. Maðurin skal sita 20 dagar beinanvegin, meðan hinir 40 dagarnir er ein treytaður dómur. Hann fekk harumframt 3.500 krónur í bót, og hald er lagt á útgerð til nýtslu av rúsevnum.

Maðurin er dømdur fyri at hava keypt125 gramm av hassji, 2 gramm av kokaini, eitt sindur av LSD, 3 gramm av amfetamini og 5 ecstacy pillarar. Eisini er hann dømdur fyri at hava gjørt eina roynd at keypa 25 ecstacy pillarar. Alt var til egið brúk.

Tá løgreglan gjørdi húsarannsókn fann hon eisini eina ólógliga salongriflu og nakrar patrónir. Hetta var maðurin eisini dømdur fyri.

Fýra tiknir fyri at koyra við kenning

SPIRITUS
Stefan í Skorini

Sunnunáttina gjørdi løgreglan eitt gott hál, tá hon tók fýra bilførarar fyri at koyra við kenning.

Allir fararnir høvdu eina promillu, sum var millum 0,5 og 0,8. Tí kunnu hesir fararnir vænta sær ein treytaðan dóm, um teir ikki longu hava ein slíkan. Um promillan var omanfyri 0,8 høvdu fararnir fingið eina treytaleysa frádøming av koyrikortinum.

At hesi fararnir eru tiknir er ein avleiðing av nýggju ferðslulógini, sum setti promillumarkið niður frá 0,8 til 0,5. Áðrenn nýggju lógina hevði løgreglan ikki havt heimild at taka hesar fararnar.

Tjóðveldisflokkurin

Skjótt er búskapurin sjálverandi

Tað bragdar í Føroyum eftir fýra ár við skilagóðari búskaparstýring. Allastaðni grør um gangandi fót, og sjálvsálitið er stórt.

Í ár framleiða vit fyri 9,6 milliardir krónur. Danski blokkurin er 615 milliónir krónur og tí bara 6,4 prosent av okkara egnu framleiðslu.

Føroyingar í bæði privatari og almennari tænastu hava æruna av, at føroyska samfelagið er um at gerast sjálvbjargið. Virkishugur byggir nú land og skapar veruliga vælferð.

Við sjálverandi búskapi verða Føroyar sjálvstøðugt og samhaldsfast land. Vend dómadagstosinum bakið og vel egnan mátt og megi 30. apríl.

X við E

Jógvan Arge
www.jogvanarge.com